# Guðrun syngur aftur í Føroyum

**Næsta vikuskiftið fer Guðrun Sólja Jacobsen at hava framførslur í Havn og í Fuglafirði. Konsertirnar eru í sambandi við, at hon hevur givið nýggja fløgu út**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*



*Guðrun Sólja Jacobsen hevur verið nógv frammi í Danmark síðstu vikurnar, men næsta vikuskiftið kann hon aftur upplivast á føroyskum palli.*

Um eina viku kemur Guðrun Sólja Jacobsen til Føroya at hava tvær konsertir. Tær verða á dansistaðnum Rex í Havn og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tað hevur verið nógv á skránni hjá Guðrun í Danmark seinastu tíðina. Hon gav fyrst í februar mánaði nýggja fløgu út, og hon hevur gjørt pr-arbeiði í sambandi við fløguna. Sølan av fløguni hevur gingið væl bæði í Danmark og í Føroyum, og tað ger stóran mun í Danmark, at fløgan hevur verið førd fram í sjónvarpslýsingum.

Á nýggju fløguni eru tulkingar av kendum sangum, men onkur einstakur nýggjur sangur er eisini á fløguni.

## Úr at gera

Umframt nýggju útgávuna hevur Guðrun Sólja Jacobsen eisini verið nógv frammi í sambandi við kappingina Stjørna eitt kvøld, sum DR hevur skipað fyri seinastu vikurnar.

Guðrun kom allan vegin í finaluna, og hóast hon hevði eina sera góða framførslu í finlauni, vann hon ikki fram millum tey trý fremstu í kappingini.

Nú hevur Guðrun aftur stundir at koma heim til Føroya at hava konsertir, og næsta vikuskiftið verður møguleiki at hoyra hana syngja í Havn og í Fuglafirði.

Fríggjakvøldið 11. mars syngur Guðrun í Rex í Havn, og kvøldið eftir, tann 12. mars, verður hon at hoyra í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

## Showmenn spæla við

Síðsta summar hevði Guðrun Sólja Jacobsen onkra framførslu í Føroyum, har tónleikararnir í Showmonnum spældu undir hjá henni, og tað samstarvið eydnaðist so væl, at tað verður endurtikið næsta vikuskiftið.

Til tiltakið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, sum er bæði konsert og dansur, fara Showmenn eisini at spæla til dans part av tíðini.

Forsøla er tiltakið í Fuglafirði, og atgongumerkini kunnu keypast á Shell-støðunum kring landið.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av útnyrðingi og vestri og seinnapartin møguliga regn. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -- |
| Seyðisfjørður | -- |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 3 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | -3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -7 |
| Keypmannah. | -1 |
| Helsinki | -9 |
| Moskva | -6 |
| Berlin | -2 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 2 |
| Madrid | 4 |
| Róm | 5 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 10 |
| Malta | 9 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. norðan fyri Ísland fer í landsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1034 hPa. vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og mennist.




**Í dag:**
Hátrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað. Ein hitabrúgv frá Íslandi til Írlands kemur spakuliga hendavegin og gevur lýggjari veður.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 2/3 kl. 06[00]– 3/3. 06[00]. Hitin í gjár: 0,7°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 2/3 kl. 06[00]– 3/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 1,1 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


### Morgunlestrar
**7. – 12. mars**

***Súsanna Mortensen í Kvívík, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 7. mars:**
nr. 515 Guðs náði altíð er mær hjá

**Týsdagin 8. mars:**
nr. 333 Frið sum troyst í sakni ber

**Mikudagin 9. mars:**
nr. 234 Sannleikans andi, lat sannleikans ljós títt oss skína

**Hósdagin 10. mars:**
nr. 374 Um synd og skomm teg hava sprongt

**Fríggjadagin 11. mars:**
nr. 375 Miskunnarsami Guð, mildi Harri mín

**Leygardagin 12. mars:**
nr. 14 Lat sálmin frá tí lága

## VESTFALLSKYRRINDI

3. mars

20.febr. Mánin longst frá jørðini
3. mars Seinna kvarter
8. mars Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. mars | 00.46 | 13.27 | - | 12.27 | 00.01 | 12.42 | 02.46 | 15.27 | 03.46 | 16.27 | 11.42 | - | 10.42 | 23.11 | 01.01 | 13.42 | 02.01 | 14.42 | 00.31 | 13.12 | 01.46 | 14.27 |
| 5. mars | 01.56 | 14.26 | 00.56 | 13.26 | 01.11 | 13.41 | 03.56 | 16.26 | 04.56 | 17.26 | 00.11 | 12.41 | 11.41 | - | 02.11 | 14.41 | 03.11 | 15.41 | 01.41 | 14.11 | 02.56 | 15.26 |
| 6. mars | 02.55 | 15.24 | 01.55 | 14.24 | 02.10 | 14.39 | 04.55 | 17.24 | 05.55 | 18.24 | 01.10 | 13.39 | 00.10 | 12.39 | 03.10 | 15.39 | 04.10 | 16.39 | 02.40 | 15.09 | 03.55 | 16.24 |
| 7. mars | 03.52 | 16.20 | 02.52 | 15.20 | 03.07 | 15.35 | 05.52 | 18.20 | 06.52 | 19.20 | 02.07 | 14.35 | 01.07 | 13.35 | 04.07 | 16.35 | 05.07 | 17.35 | 03.37 | 16.05 | 04.52 | 17.20 |
| 8. mars | 04.46 | 17.13 | 03.46 | 16.13 | 04.01 | 16.28 | 06.46 | 19.13 | 07.46 | 20.13 | 03.01 | 15.28 | 02.01 | 14.28 | 05.01 | 17.28 | 06.01 | 18.28 | 04.31 | 16.58 | 05.46 | 18.13 |

5 707265 100050 >